umhvørvisstovan
FAROESE ENVIRONMENT AGENCY

# Vegleiðing til fuglakanningar ísv. umhvørvisárinsmetingar á landi

Vegleiðing 22/2026

Útgáva 1, februar 2026

## Innihald


1. Inngangur ... 3

2. Meginreglur og allýsingar ... 4

2.1 Allýsingar ... 4

2.2 Førleikakrøv til eygleiðarar ... 6

2.3 Tíðarskeið fyri kanningar ... 6

2.4 Árin á fuglastovnar ... 6

2.4.1 Samanbrestir ... 7

2.4.2 Beinleiðis missur av búøki (habitat) ... 7

2.4.3 Óbeinleiðis missur av búøki (habitat) ... 7

3. Undankanning ... 8

3.1 Fuglasløg, ið skulu kannast ... 9

3.2 Økið, ið skal kannast ... 9

4. Kanningarhættir ... 10

4.1 Útbreiðslu- og nøgdarkanningar ... 10

4.2 Útsýnisstaðkanningar (ÚSK) ... 11

4.3 Aðrir kanningarhættir ... 13

5. Skráseting av og frágreiðing um dátur ... 13

Fylgiskjal 1. Nágreiniligar útsýnisstaðkanningar í bútíð, uttanfyri bútíð og í ferðingartíð ... 14

Fylgiskjal 2. Kanningarleistur fyri mest vanlig sløg ella bólkað sløg ... 20

Fylgiskjal 3. Hvussu dátur kunnu skrásetast ... 22

# 1. Inngangur

Elveitingarlógin[1] ásetur, at áðrenn loyvi til elframleiðslu verða boðin út ella loyvi til fjarhitavirksemi verða latin, skal metast um avleiðingarnar fyri náttúru og umhvørvi, og úrslit av hesi meting skulu verða góðkend av Umhvørvisstovuni. Endamálið við Umhvørvisárinsmetingum er at tryggja, at mett verður um tey árin, sum verkætlanir, ið eru fevndar av lógini, kunnu hava á umhvørvið. Upplýsingarnar, sum byggiharrin skal veita um verkætlanina í árinsmetingini, skulu á hóskandi hátt vísa á, lýsa og meta um tey beinleiðis og óbeinleiðis árin, sum verkætlanin kann hava á eitt nú djóra- og plantulív, íroknað á fugl.

Henda vegleiðing er ætlað byggiharra, sum hevur ábyrgd av at gera fuglateljingar í sambandi við umhvørvisárinsmeting fyri orkuverkætlanir á landi. Vegleiðingin kann í nógvum førum eisini brúkast sum liður í árinsmeting av øðrum verkætlanum, eitt nú vegagerð. Vegleiðingin er tó ikki ætlað til verkætlanir á sjónum.

Vegleiðingin fevnir um neyvari lýsing um

- undankanningar,
- kanningar á staðnum, og
- skráseting av og frágreiðing um dátur.

Vegleiðingin tekur støði í líknandi krøvum, sum verða sett í okkara grannalondum, serliga í skotsku vegleiðingini um fuglakanningar í sambandi við árinsmetingar av vindorkuverkætlanum á landi.[2]

[1] Løgtingslóg nr. 59 frá 7. juni 2007 um um el og fjarhita, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 67 frá 30. mai 2024 (elveitingarlógin).

[2] Scottish Natural Heritage, 2025. Recommended bird survey methods to inform impact assessment of onshore wind farms.

# 2. Meginreglur og allýsingar

## 2.1 Allýsingar

| **Hugtak** | Frágreiðing |
|---|---|
| **Burturtrokan**<br>*(fortrængning)* | Árin frá verkætlanini, sum forða fuglinum í at brúka eitt øki. Tað kann t.d. vera óljóð ella ljósdálking frá verkætlanini |
| **Búfuglur** | Fuglur, sum reiðrast í Føroyum. |
| **Bútíð** | Tíðarskeið, ið fuglur reiðrast |
| **Búøki**<br>*(habitat)* | Øki, har fuglur livir, t.e. hvíldarøki og øki, har fuglur reiðrast |
| **Byggiharri** | Persónur, felag ella annar løgfrøðiligur persónur, sum tekur stig til og søkir um góðkenning av eini umhvørvisárinsmeting, íroknað almennur myndugleiki, sum egna vegna - ella sum vegna vinnuna - tekur stig til eina verkætlan. Byggiharri fevnir eisini um ráðgevandi fyritøku, sum ger kanningar fyri byggiharra |
| **Flogleið**<br>*(flight route)* | Tann leiðin, sum fuglur horisontalt og vertikalt flýgur til og frá búøki, t.d. at vitja vøtn ella út á hav, íroknað flytifugl |
| **Flogvirksemi**<br>*(flight activity)* | Árstíð og tíðarskeið á samdøgri, har fuglur flýgur og er virkin (veldst um slag og árstíð og um teir reiðrast) |
| **Forðingarárin**<br>*(barriereeffekt)* | Tá verkætlanin skapar eina forðing á flogleiðini, so fuglurin noyðist at flúgva rundan um verkætlanarøkið fyri at sleppa til vanlig lívøki ella finna sær nýggj lívøkir |
| **Framsýnisatferð og -flúgving**<br>*(Display, display flight)* | Atburður, har fuglur ger seg upp, serliga í samband við at fuglur leitar sær eftir maka (paringardansur) |
| **Fuglavirksemi** | Virksemi hjá fugli. |
| **Geldfuglur** | Ungur ella fullvaksin fuglur, sum ikki reiðrast |

| | |
|---|---|
| **Hvíldarøki**<br>*(rasteområde)* | Øki, har fuglur heldur til fyri at hvíla seg |
| **IBA-øki**<br>*(important bird area)* | Øki, sum sambært BirdLife International hava avgerandi týdning fyri fuglar og lívmargfeldið. |
| **Kanningarøki** | Øki, fuglakanningin fevnir um í ætlaðu verkætlanini |
| **Lívøki/vistfrøðilig nyttuøki** | Øki, sum hevur vistfrøðiligan týdning fyri eitt slag, til dømis tilhald, búøki, ferðingarleið, at gýta, vaksa, søkja føði, skifta ham, hvíla, makast ella yngla |
| **Støðufuglur** | Fuglur, ið heldur til á sama stað alt árið. |
| **Tilskilað fuglaøki** | Tilskilað øki, ið hevur týdning fyri fugl. Hetta fevnir m.a. um økir, ið verja fugl, so sum náttúruverndarøki ella Ramsar-økir, men eisini IBA-økir eru fevnd av hugtakinum. |
| **Útsýnisstað**<br>*(Vantage point)* | Stað at eygleiða fugl sum liður í útsýnisstaðkanning |
| **Útsýnisstaðkanningar**<br>*(Vantage Point Survey)* | Kanningarháttur frá útsýnisstøðum at skráseta lívøki og flogvirksemi |
| **Vard sløg** | Vard plantu- og djórasløg (serliga fuglasløg) sambært § 10 í náttúruverndarlógini |
| **Váðahædd** | Floghædd, ið kann elva til samanbrest ísv. verkætlan |
| **Verkætlanarøki** | Øki, sum samlaða verkætlanin fevnir um, t.d. vindmyllur, tilhoyrandi teknikkbygningar, vegakervi og økini kring og millum hesi |
| **Verndarøki** | Vart øki sambært kapittul 4 í náttúruverndarlógini; tjóðgarðar, náttúrufriðingarøkir, lívøkisvernd, landslagsvernd og sjóverndarøkir. |

## 2.2 Førleikakrøv til eygleiðarar

Góðskan á fuglakanningini er í stóran mun treytað av eygleiðarunum, ið savna upplýsingarnar. At nýta eygleiðarar við hóskandi førleikum og royndum til fuglateljingar er tískil avgerandi.

Tað er ábyrgdin hjá byggiharra at tryggja, at umhvørvisárinsmetingin og allar neyðugar undankanningar – herímillum metingar av møguligum árini á fugl – eru gjørdar av serfrøðingum við hóskandi førleikum og royndum. Hetta fevnir m.a. um persónar, sum hava hóskandi útbúgving, eitt nú lívfrøðingar við serkunnleika um fugl. Persónar, ið hava drúgvar royndir við at eygleiða fugl og teirra atferð, kunnu væntast at hava neyðugu førleikarnar og kunnu ofta eisini metast sum serfrøðingar.

Byggiharri kann nýta innanhýsis ráðgeving til fuglakanningar og árinsmeting, um nøktandi førleikar eru til tað.

## 2.3 Tíðarskeið fyri kanningar

Kanningar skulu fara fram, tá fuglar eru mest virknir, og skulu fevna um allar tíðir á árinum, tá viðkomandi fuglur er til staðar. Hetta veldst um sløgini eru støðufuglur ella ferðafuglur, nær búfuglurin reiðrast, og tey tíðarskeið, har viðkomandi fuglasløg brúka verkætlanarøkið. Hetta verður nærri útgreinað í fylgiskjali 1 og 2.

Fuglakanningar skulu fevna um minst eitt ár, men neyðugt er at leggja upp fyri, at umstøður kunnu hava við sær, at úrslitini frá einum einkultum ella einstøkum ári ikki eru nøktandi. Hetta kann eitt nú vera, um sveiggj eru í stovninum, um kanningar ikki eru farnar rætt fram, ella um undankanning staðfestir, at økið er búpláss hjá fugli, sum ikki er staðbundin frá ár til ár, so sum terna (*Sterna paradisaea*). Tá kann tað hava týdning, at telja fugl í eitt longri tíðarskeið, upp í fleiri ár, fyrr enn vissa er fyri, at kanningin á fullgóðan hátt lýsir fuglalívið í kanningarøkinum. Hetta er serliga galdandi, um ongar aðrar kanningar verða gjørdar, og ongin onnur vitan um fugl í økinum er tøk.

Gev gætur, at jú styttri og veikari kanningarnar og sostatt vitanin er um fugl í økinum, tess økist sannlíkindini fyri, at partar í málinum ella onnur ynskja eitt betri grundarlag um fugl og lívøki teirra. Metir Umhvørvisstovan, at kanningar ikki eru nøktandi, kann Umhvørvisstovan ikki góðkenna umhvørvisárinsmetingina. Hetta kann viðføra, at tað seinni í tilgongdini koma nýggj krøv um kanningar, sum aftur kunnu seinka verkætlanina. Tað er tí av stórum týdningi, at farið verður undir fuglakanningar tíðliga í verkætlanartilgongdini.

Velur byggiharri at víkja frá tilmælunum um tíðarskeið fyri, nær kanningar skulu gerast, eitt nú um kanning verður gjørd í eitt styttri tíðarskeið, skal hann fyri avvarðandi myndugleika grundgeva fyri hesum, og hví kanningin er nøktandi.

## 2.4 Árin á fuglastovnar

Árin á fugl frá verkætlanum á landi kann í høvuðsheitum býtast í tríggjar flokkar:

A. Beinleiðis deyða ella skaða frá **samanbresti**,
B. beinleiðis missur av **búøki (habitat)**, og
C. **óbeinleiðis missur av búøki (habitat)**.

Hvørjir árinsflokkar eru viðkomandi veldst um ætlaðu verkætlanina, herundir staðseting, stødd og slag av virksemi og um fuglin í og nærhendis verkætlanarøkinum. Flogvirksemi og atferð hjá einstøkum fuglasløgum hevur eisini stóra ávirkan á, hvørji árin verkætlanin kann hava. Til dømis er vandin fyri samanbrestum størri fyri vindmylluverkætlanir og vegagerð enn fyri sólorkuverkætlanir, og summi fuglasløg eru í størri vanda fyri samanbresti enn onnur. Uttan mun til, hvat slag av árini er viðkomandi fyri ætlaðu verkætlanina, er neyðugt við nágreiniligari vitan um útbreiðslu og flogvirksemi hjá viðkomandi fuglasløgum. Tí eiga atlit at verða tikin til møgulig árin á fuglalív longu í innleiðandi stigi av eini verkætlan, soleiðis at tað ber til at gera tillagingar í verkætlanini, sum minka um váðan fyri neiliga ávirkan á fugl.

### 2.4.1 Samanbrestir

Váðin fyri at fuglur doyr ella fær skaða frá samanbresti veldst um slagið og støddina á ætlaðu verkætlanini, lendið nærhendis verkætlanini og hvørji fuglasløg halda til í økinum. Váðin er serliga kendur frá vindmylluverkætlanum, har váði er fyri deyða ella skaða frá samanstoyti við vindmylluveingir ella vindmyllutorn. Váði fyri samanbrestum er tó eisini til staðar í sambandi við aðrar verkætlanir, eitt nú vegagerð og bygging ella víðkan av flogvøllum.

Verður verkætlanin staðsett í einum øki, sum er vistfrøðiligt nyttuøki hjá fugli, eitt nú í ferðaleiðum ella vátlendi, so økist váðin fyri samanbresti.

### 2.4.2 Beinleiðis missur av búøki (habitat)

Um verkætlanarøki heilt ella lutvíst verður staðsett í búøki hjá fugli, og um broytingin hevur við sær, at fuglurin ikki longur hevur møguleika at brúka økið, er talan um beinleiðis miss av lívøki. Missur av lívøki minkar um rásarúmið hjá teimum sløgum, sum vanliga brúka økið, og kann, um tað eru lítlir bústovnar, hava við sær, at stovnurin minkar, um ikki fuglurin finnur onnur øki.

### 2.4.3 Óbeinleiðis missur av búøki (habitat)

Verkætlanir, sum eru staðsettar nærhendis vistfrøðiligum nyttuøkjum hjá fugli, órógva fugl. Nógv fuglasløg skýggja verkætlanir/virksemi, ið órógva. Hetta kann hava við sær, at fuglurin ikki brúkar eitt ávíst øki, hann annars hevði brúkt. Hetta kallast burturtrokan ella óbeinleiðis missur av búøki.

Hugtakið burturtrokan umfatar eisini forðingarárin, sum koma fyri, um fuglastovnar verða forðaðir í at náa eitt nú hvíldarøkjum ella støðum at finna sær føði, tí verkætlanin virkar sum ein forðing á flogleiðini. Hetta hevur við sær, at fuglur brúkar eyka orku at leita sær aðrar leiðir og kann ávirka møguleikan hjá fugli at nørast í landslagnum.

## 3. Undankanning

Áðrenn farið verður undir at gera feltkanningar er neyðugt at savna inn tøka vitan um fuglastovnar, sum halda til ella brúka ætlaða verkætlanarøkið og lendi nærhendis, umframt vitan um, í hvønn mun viðkomandi fuglasløg eru viðkvom fyri teimum árinum, sum verkætlanin kann hava við sær. Henda vitan er grundarlagið undir at skipa og áseta støðið av kanningararbeiðinum á staðnum. Undankanningin staðfestir sostatt, hvørjar kanningar tørvur er á, og vavið av kanningunum.

Í undankanningini verða serliga savnaðar upplýsingar um

- fuglastovnar,
- lívøkir, og
- nærri tilskilað fuglaøki.

Staðsetingin, vavið av verkætlanini og viðkvæmi hjá fuglum í økinum gera av, hvørji fuglasløg tað er viðkomandi at kanna nærri og longdina av kanningartíðini.

Í summum førum kann tað vera nóg mikið at meta um tøkar dátur, uttan at tørvur er á nýggjum kanningum á staðnum. Hetta krevur, at nøktandi dátur frá fuglaskrásetingum í og nær verkætlanarøkinum eru tøkar og egnaðar til at meta um møgulig árin á fugl, sum er viðkomandi fyri ætlaðu verkætlanina, sí *2.4 Møgulig árin á fugl*. Krøvini til nýggjar kanningar kunnu vera minni til verkætlanir, sum eru minni í vavi, og sum ikki væntast at hava munandi árin á fugl. Smærri verkætlanir kunnu eisini hava munandi árin á fugl, serliga um tær verða staðsettar nær tilskilaðum fuglaøkjum so sum náttúruverndarøkjum ella Ramsar-økjum. Kanningararbeiði og meting av møguligum árinum á fugl skal samsvara við vavið á verkætlanini og fuglavirksemi í økinum.

Dátutrot í undankanningini er **ikki** í sjálvum sær ein ábending um, at fuglavirksemið er lítið í ella nær verkætlanarøkinum, og at verkætlanin ikki kann hava við sær munandi árin á fugl.

Um ongar dátur eru tøkar um fuglavirksemi í kanningarøkinum (sí *3.2 Økið, ið skal kannast*), ella um dáturnar eru so mikið gamlar, at tær ikki væntast at vera rættvísandi, er neyðugt at savna dátur á staðnum. Eitt nú mugu útbreiðslu- og nøgdarkanningar gerast á staðnum fyri at staðfesta fuglavirksemi í og nærindis ætlaða verkætlanarøkinum, og neyðugt kann eisini vera at gera útsýnisstaðkanningar, eitt nú um vandi er fyri samanbresti, sí *4. Kanningarhættir*.

Í undankanningini er tað viðkomandi at savna inn lokala vitan frá staðkønum fólki um eitt nú staðanøvn, søgulig náttúruvirðir, um reiðrandi fugl og plantur, og hvør nýtsla hevur verið viðkomandi fyri økið, so sum torvskurður, seyðabit, seyðaból, og siðsøgulig virði so sum gamlar fornleivdir, rættir og torvhús.

Við yvirliti yvir møguligar fuglastovnar í og nærindis verkætlanarøkinum, viðkvæmi fyri møguligum árinum frá ætlaðu verkætlanini og frástøða til lívøki og tilskilað fuglaøki, sí *3.2 Økið, ið skal kannast*, ber til at áseta støði av kanningum á staðnum og gera nágreiniliga kanningarætlan í mun til tilskilað fuglasløg.

## 3.1 Fuglasløg, ið skulu kannast

Ofta verða kanningar avmarkaðar til fuglasløg, sum eru vard sambært lóggávu ella altjóða avtalum, ella til sløg, sum verða raðfest, m.a. tí tey eru hótt ella hava atburð, sum ger tey meiri viðkvom fyri árin frá ætlaðu verkætlanini. Enn eru eingi fuglasløg vard av føroysku náttúruverndarlógini. Tí krevst serligt fyrivarni, tá støða skal takast til, hvørji fuglasløg skulu kannast. Hugsast skal serliga um verndarstøðu ella viðkvæmi fyri árinum frá verkætlanini.

Eisini eigur at verða kannað, um fuglasløg í økinum eru á føroyska reyðlistanum.[3] Reyðlistin er yvirlit yvir sjáldsom plantu- og fuglasløg í Føroyum. Havast skal í huga, at reyðlistin er eitt útkast, hann er ikki lógarásettur og ikki dagførdur síðan 2005. Reyðlistin kann tí ikki væntast at vera heilt eftirfarandi og má ikki vera einasta grundarlag undir fuglakanningunum. Hóast hetta er reyðlistin eitt gott byrjunarstøði, tá mett verður um, hvørji fuglasløg skulu kannast.

## 3.2 Økið, ið skal kannast

Økið, ið skal kannast, fevnir um alt verkætlanarøkið og møguligar alternativar staðsetingar, um endaliga staðsetingin ikki er avgjørd. Verkætlanarøkið fevnir m.a. um økir til bygningar, atkomuvegir, grótgoymslur, el-støðir og onnur arbeiðsøkir og økini ímillum hesi.

Verkætlanir kunnu hava við sær árin á fugl uttanfyri ætlaða verkætlanarøkið. Tí eiga kanningar sum meginregla at verða gjørdar 500 m út um verkætlanarøkið. Hetta veldst tó um umstøðurnar kring verkætlanina og um fuglin í økinum. Byggiharrin eigur ábyrgdina av at tryggja, at eitt nóg stórt øki verður kannað.

Tá farið verður undir at gera kanningar, skal atlit eisini takast til nærri tilskilað økir, ið verja fugl. Í Føroyum hava vit trý sløg av tílíkum útvaldum økjum:

- vistfrøðilig nyttuøki hjá vardum fuglasløgum sambært §§ 10-11 í náttúruverndarlógini,
- vard økir sambært kapittul 4 í náttúruverndarlógini, og
- Ramsar-økir sambært Ramsar-sáttmálanum.

Harafturat eru fleiri sokallað *Important Bird Areas* (IBA) í Føroyum. IBA eru partur av eini altjóða verkætlan hjá BirdLife International, sum eyðmerkir øki, sum eru avgerandi fyri fuglar og lívmargfeldi. Hóast hesi økini ikki eru lógarásett, siga tey nakað um væntaða fuglavirksemið í økinum, og eru tey ofta viðkomandi at kanna í sambandi við umhvørvisárinsmetingar.

Byggiharrin eigur ábyrgdina av at tryggja, at møgulig árin á økir, ið eru týðandi fyri fugl (vistfrøðilig nyttuøkir), verða kannað, hóast tey ikki eru vard. Eisini skal havast í huga, um ferðingarleiðir millum vistfrøðilig nyttuøkir leiða fuglin gjøgnum ætlaða verkætlanarøkið.

---

[3] Fosaa et al, 2005. Reyðlisti - Náttúrulýsing lendi og sløg.

# 4. Kanningarhættir

Ymiskir kanningarhættir eru neyðugir fyri at meta um ymsu árinsflokkarnar. Henda vegleiðing lýsir yvirskipað teir kanningarhættir, sum oftast eru viðkomandi fyri verkætlanir á landi. Í sambandi við ávísar verkætlanir, t.d. verkætlanir í ávísum økjum, kann tað vera viðkomandi at brúka aðrar kanningarhættir sum liður í umhvørvisárinsmeting, sí *4.3 Aðrir kanningarhættir*.

Í hesi vegleiðing verður mælt til tveir kanningarhættir:

1. **Útbreiðslu- og nøgdarkanningar**
2. **Útsýnisstaðkanningar (ÚSK)**

Útbreiðslu- og nøgdarkanningar kunnu serliga brúkast sum grundarlag undir metingum um vágan fyri beinleiðis og óbeinleiðis miss av búøki. Útsýnisstaðkanningar geva týðandi innlit í, hvussu fuglur brúkar verkætlanarøkið og nærindis lendi, og er neyðugur kanningarháttur fyri at lýsa váðan fyri, at fuglur doyr í samanbresti.

Byggiharrin eigur ábyrgdina av at tryggja, at kanningar verða gjørdar, sum á nøktandi hátt lýsa náttúruna og fuglalívið á staðnum og møgulig árin av ætlaðu verkætlanini á viðkomandi fuglastovnar. Velur byggiharrin at víkja frá tilmæltu kanningarhættunum, skal hann fyri avvarðandi myndugleika grundgeva fyri hesum, og hví teir valdu kanningarhættirnir eru nøktandi.

## 4.1 Útbreiðslu- og nøgdarkanningar

Útbreiðslu- og nøgdarkanningar fevna um at skráseta fuglanøgd og útbreiðslu fyri at meta um týdningin av økinum og møgulig árin frá ætlaðu verkætlanini. Mannagongdin veldst um viðkomandi fuglasløg, lendi og árstíð. Eisini kann munur vera á bútíðini frá øki til øki í Føroyum og ímillum ár.

Vanliga verður gingið gjøgnum økið, ið skal kannast (hetta verður rópt “walkover” á enskum), og allur fuglur í økinum verður skrásettur, herundir reiðrandi pør. Leiðin, sum verður gingin, skal umboða kanningarøkið. Lýsing skal gerast av økinum, við serligum atliti at lendissløgum, sum kunnu hava týdning fyri fuglalívið, eitt nú vøtn, vátlendi, klettar og urðar. Skoðan eftir fugli og fuglaljóðum skal gerast javnan. Tilskilast skal, hvar í økinum, hvør fuglur er skrásettur. Eisini skal skilmarkast, um talan er um pør ella einstakar fuglar, og hvar mett verður, at fuglur reiðrast (*Apparently Occupied Territory*) ella reiður eru funnin. Verða reiður funnin, skal tal av eggum ella ungum skrásetast.

Slíkar útbreiðslu- og nøgdarkanningar skulu gerast í minsta lagi tríggjar ferðir við minst einum degi ímillum. Kanningarnar skulu fevna um bæði fyrrapart og seinnapart. Sí fylgiskjal 2 um kanningarleistir fyri mest vanligu sløg ella bólkað sløg.

Um byggiharrin ætlar at brúka aðrar kanningarhættir enn teir viðmæltu, skal byggiharrin grundgeva og sannføra avvarðandi myndugleika um, at kanningarhátturin er nøktandi og gevur rættvísandi úrslit.

## 4.2 Útsýnisstaðkanningar (ÚSK)

Útsýnisstaðkanningar eru týdningarmiklar fyri at staðfesta flogvirksemi hjá fugli í og nærindis verkætlanarøkinum. Høvuðsendamálið er at útvega dátur til váðalýsingar fyri samanbrestir (*Collision Risk Modelling*), sum ger forsagnir um deyðstíttleika frá samanbresti. Útsýnisstaðkanningar eru tí serliga viðkomandi fyri verkætlanir við stórum váða fyri samanbresti, eitt nú vindmylluverkætlanir og vegagerð. Dáturnar kunnu eisini, saman við dátum frá útbreiðslu- og nøgdarkanningum, nýtast til at meta um váðan fyri óbeinleiðis missi av lívøki. Tó má havast í huga, at tær dáturnar ikki vóru savnaðar við tí endamáli og kunnu vera misvísandi, um tær standa einsamallar.

Dátur verða savnaðar undir tíðaravmarkaðum eygleiðingum frá frammanundan valdum útsýnisstøðum, har skrásett verður, hvar og hvussu fuglur flýgur ígjøgnum og lendir í verkætlanarøkinum og nærindis lívøkjum.

**Útsýnisstøð**

Frá útsýnisstøðum skal vera útsýni yvir alt viðkomandi lendi í og nærindis verkætlanarøkinum, soleiðis at einki stað í økinum, sum er fevnt av kanningini, er meiri enn 2 km frá einum útsýnisstaði. Havast skal í huga, at sýnið versnar við størri frástøðu, serliga til at eygleiða smærri fuglasløg.

Í summum førum ber til at nýta sonevnd “*distance detection methods*” til at meta um hægstu gjørligu frástøðu.[4]

Um neyva staðsetingin av verkætlanini (t.e. endaliga staðsetingin av t.d. vindmyllum ella vegalinjum) ikki er kend, skal útsýni havast yvir alt økið, har verkætlanin kann verða staðsett. Eisini er neyðugt at hava útsýni yvir nærindis lívøkir hjá fugli, so staðfestast kann, um samband (*connectivity*) er millum verkætlanarøkið og vistfrøðilig nyttuøki hjá ymsum sløgum.

Um verkætlanarøkið liggur í ella nærhendis tilskilað fuglaøki, er neyðugt at meta um møgulig árin á náttúruvirðini, sum verndin fevnir um. Í slíkum føri eigur flogvirksemi hjá sløgum, sum økið skal verja, at verða skrásett, so til ber at meta um flogleiðir inn og úr økinum.

Mælt verður til at eygleitt verður í einum boga upp til 180° frá hvørjum útsýnisstaði. Størri bogar kunnu ikki eygleiðast á nøktandi hátt.

---

[4] Scottish Natural Heritage, 2025. Recommended bird survey methods to inform impact assessment of onshore wind farms. Sí serliga brot *3.8.2.1 Distance*).

Tað er av stórum týdningi, at staðsetingin av valdu útsýnisstøðunum verður endaliga staðsett og nágreiniliga skrásett við GPS, og at hon ikki verður broytt ímillum eygleiðingarumførini. Sjálvt smáar broytingar í staðsetingini av útsýnisstøðum kunnu broyta útsýnið munandi, og kunnu tí hava við sær stórar óvissur í lýsingum av váða fyri samanbresti.

Tá útsýnisstøð verða vald, skal tryggjast, at fuglurin verður órógvaður minst møguligt, so úrslitini verða rættvísandi.

**Tíð**

Tess meiri tíð, ið verður brúkt til eygleiðing í útsýnisstaðkanningum, tess betri verður metingin av flogvirksemi og atferð hjá fugli í og nær verkætlanarøkinum.

Viðmælt verður, at í minsta lagi 72 tímar verða nýttir á hvørjum útsýnisstaði, býtt millum árstíðir, t.e. 36 tímar í bútíð og 36 tímar uttan fyri bútíð.

Í serliga viðkvæmum ella týðandi økjum fyri fugl eigur útsýnisstaðkanningin at vera longri. Er vitan ella væntan um nógva ferðing (*migration movement*), skal eygleiðingartíðin eisini fevna um viðkomandi ferðatíðarskeið um várið og heystið.

Í hvørjum tíðarskeiði (t.e. í bútíðini og uttanfyri bútíð) skulu í minsta lagi 36 tímar av eygleiðingum gerast fyri hvønn part av verkætlanarøkinum. Um helvtin av verkætlanarøkinum er eygleitt í 36 tímar, og til dømis onnur helvt er eygleidd í 36 tímar, uttan at økini umskarast, so er verkætlanarøkið eygleitt í tilsamans 36 tímar, og ikki 72 tímar, hóast samlaða talið av eygleiðingartímum.

Eygleiðingar gjørdar undir einari útbreiðslu- og nøgdarkanning kunnu ikki roknast við í eygleiðingartíðina til útsýnisstaðkanningar.

Fyri at tryggja góðskuna á kanningunum kann tíðarskeiðið fyri hvørja eygleiðing ikki vera longri enn tríggjar tímar. Endamálið við eygleiðingunum er at vísa flogvirksemi fuglanna, og mett verður, at fleiri styttri kanningar eru neyvari enn færri longri kanningar.

**Skráseting**

Fyri neyvari vegleiðing um skráseting av dátum frá útsýnisstaðkanningum verður víst til skotsku vegleiðingina um fuglakanningar í sambandi við umhvørvisárinsmetingar av vindmyllum á landi.[5]

---

[5] Scottish Natural Heritage, 2025. Recommended bird survey methods to inform impact assessment of onshore wind farms. Sí serliga brotini *3.8.8 Vantage Point Watch Recording* og *3.8.10 Recording*.

### 4.3 Aðrir kanningarhættir

Fyri sløg, sum eru mest virkin um náttina, er møguliga tørvur á øðrum kanningarhættum, eitt nú við sonevndum kamerafellum, "*Passive Acoustic Monitoring*", náttarsjón (FLIR) ella radartøkni.

Fyri hótt ella raðfest sløg kann tað vera viðkomandi at nýta GPS-sporingstøkni. Til slíkt arbeiði er neyðugt við granskingar- og djóraetiskum loyvum.

## 5. Skráseting av og frágreiðing um dátur

Úrslit frá kanningum skulu verða týðiliga lýst í frágreiðing sum grundarlag undir parti av umhvørvisárinsmetingini um árin á fugl, og skal innihalda:

- Úrslit av fullfíggjaðum kanningum. Um kanningarnar ikki eru lidnar ella nøktandi, kunnu úrslitini ikki brúkast sum grundarlag undir metingini av árin á fugl.
- Upplýsingar um førleikar og royndir hjá teimum, ið hava gjørt kanningarnar.
- Nágreiniligar skrásetingar av kanningararbeiði, herundir dagfestingar, tíðarskeið og veðurlíkindi. Fylgiskjal 3 vísir dømi um nøktandi skrásetingarhátt.
- Tá viðkomandi meting av váða fyri samanbresti (*collision risk modelling*).
- Málfast kort, ið vísir øll útsýnisstøð, sum eru brúkt til útsýnisstaðkanningarnar. Kortið skal eisini vísa ætlaða verkætlanarøkið, so til ber at meta um frástøðuna til útsýnisstøðini. Tá tað er viðkomandi, skulu talva og kort gerast, sum vísa flogvirksemi hjá fugli í ætlaða verkætlanarøkinum.
- Staðsetingin av skrásetingum av fugli og reiðrum skal týðiliga vísast á korti og talvu. Staðsetingin skal lýsast so neyvt sum gjørligt, tá tað ber til við eina positión fyri hvørja eygleiðing ella sum polygonir við samsvarandi positiónum, sum vísa á økið, sum talt var í.

Allar dátur frá fuglakanningunum skulu vera tøkar í hóskandi talgildum sniði (digitalum formati), t.d. CSV, Excel, GIS ella samsvarandi.

Mælt verður til at brúka FAIR-meginregluna[6], sum tryggjar, at dátur eru lættar at finna og tulka, og sum fremur samstarv og vitanardeiling.

Tí verður eisini mælt til, at metadátur verða latnar inn saman við úrslitunum eftir leisti hjá Umhvørvisstovuni. Metadáturnar geva eina greiðari lýsing av dátunum fyri soleiðis at skapa yvirlit. Upplýsingar fevna um:

- hvør hevur framleitt dáturnar,
- hvørjar upplýsingar eru at finna í dátufílunum, og

[66] **F**indable, **A**ccessible, **I**nteroperable and **R**eusable (FAIR).

- nær, hvar, hví og hvussu dáturnar vórðu framleiddar.

Hetta verður kallað metadátur. Skrásetingarskjal saman við hondbók fyri, hvussu metadátur skulu skrásetast, er á heimasíðuni hjá Umhvørvisstovuni.

## Fylgiskjal 1. Nágreiniligar útsýnisstaðkanningar í bútíð, uttanfyri bútíð og í ferðingartíð

| Slag | Viðmælt minsta tal av eygleiðingartímum per árstíð:<br>(R) Bútíð<br>(U) Uttanfyri bútíð<br>(F) Ferðingartíðin | | | Spjaðing av eygleiðingar-tímum | Notur |
|---|---|---|---|---|---|
| | B | U | F | | |
| Lómasløg<br>*Gavidae* | 36 | 36 | N/A | Millum sólarris og sólsetur | Kanningar skulu gerast í bútíðini (seint í apríl til endan av august)<br>Kanningar skulu gerast millum sólarris og sólsetur. Fyri ikki at órógva lóm, skulu útsýnisstøð veljast og brúkast við størsta varsemi, serliga við eygleiðingar við sólarris.<br>Skynast skal ímillum geldfugl og reiðrandi fugl.<br>Flogvirksemi kemur fyri tíðliga og seint á degnum og serliga frá juni til august. |
| Lómur<br>*Gavia stellata* | 36 | 36 | N/A | Millum sólarris og sólsetur | Afturat dagseygleiðingum fyri lóm skulu teljingar ella eygleiðingar (útsýnisstaðkanning)  gerast við hyljar, tjarnir ella vøtn innan fyri 1 km frástøðu frá ætlaðu verkætlanini. |

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| | | | | | Í bútíðini skulu fuglar, sum flúgva til og frá skrásetast, og um ungar eru komnir út.<br><br>Fyri verkætlanir sum liggja í møguligum flogleiðum millum sjógv, vøtn og stað, har lómur reiðrast, er nøktandi at telja og skráseta 20-30 flúgvingar inn ella út úr økinum. Best er at skráseta flest møguligar útgangandi flúgvingar, ið gevur betri líkindi at fylgja flúgvingini, áðrenn fuglurin fer úr eygsjón (kann broytast og gerast meiri óregluligt, t.d. um ungi doyr).<br><br>Í onkrum førum kunnu færri flúgvingar vera nýtiligar til at eyðmerkja flogleiðir. Er høgur títtleiki av lómi, skulu serlig atlit takast í samráð við Umhvørvisstovuna. |
| Smyril | 36 | 36 | N/A | Millum sólarris og sólsetur | Smyril er sera trupul at eygleiða í útsýnisstaðkanningum og tískil ofta undirfráboðaður. Smyril flýgur ofta lágt (undir 15 m) og ofta hægri, serliga tá hann vísir seg fram og/ella flýgur longri teinar. |
| Vatnfuglar (gæs, svanir, antarfuglar o.a.) | 36 | 36 | | Millum og undir dimmalætting og dimmi | Várflytingin er frá mars til miðjan mai, og heystflytingin er frá september til november, men veldst um slag og stað. Teljingar eiga í ávísum førum at gerast afturat (sí 4.2). Flyting er ofta tengd at veðri, so málrættaðar eygleiðingar skulu á skrá, tá ið veðrið talar fyri, at viðkomandi sløg ferðast. Slík tillaging ger kanningina meiri eftirfarandi enn kanningar fastar tíðir um várið og heystið. |
| Gæs | 36 | 36 | | Millum og undir | Orsakað av stórum vøkstri í føroyska bústovninum og av útbreiðsluni av grágás og brandgás er avbjóðandi at skyna ímillum búfugl og ferðafugl á veg til ella úr Íslandi. |

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| | | | | dimmalætting og dimmi | Ferðandi fuglur (á vetrarvisti) í Føroyum kann síggjast leita sær føði um náttina, og tí skulu eygleiðingar av flúgvandi fugli um náttina takast við í útrokningina av váða fyri samanstoyti (sí brot 4.2). Fyri verkætlanir, sum møguliga hava árin á fugl, sum flýgur til ella frá hvíldarøki, skulu kanningar gerast ein tíma áðrenn sólarris og upp til ein tíma aftaná (ella eftir at greitt er, at allur fuglurin er komin á hvíldarøkið). Fyri verkætlanir tætt at lendi, har fuglur finnur sær føði, ella sum kemur í vegin fyri øki, har hann finnur sær føði, og sum eru burturfrá hvíldarøki, skulu kanningar gerast í dagtímunum. |
| Vaðfuglar | 36 | 36 | Sí 4.2 | Millum sólarris og sólsetur | Hvørjir vaðfuglar, ið atlit skulu takast til, veldst um frástøðu til tilskilað náttúruverndarøki og um væntað slag og nøgd av virksemi.<br><br>Fuglar vísa seg í mestan mun fram tíðliga í bútíðini, við virksemi gjøgnum dagin, men ofta mest tíðliga um morgunin ella um kvøldið.<br><br>Nøkur sløg flyta til og frá øki, har tey finna sær føði, ið eru burturfrá búøkinum. Fyri ferðandi sløg kunnu kanningar í ávísum førum verða kravdar í ferðingartíðini - sí 4.2. |
| Fjallmurra | 36 | ? | N/A | Millum sólarris og sólsetur | Sera trupult er at bera eyga við fjallmurru við vanligari útsýnisstaðkanning. Fjallmurra flýgur mest lágt (undir 20 m) yvir lendið. Framsýning og onnur flúgving aftur og fram (pendliflúgving) kann tó vera hægri. |
| Grágrælingur | 36 | 36 | | Millum sólarris og sólsetur | |

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Tjaldursgrælingur | 36 | 36 | | Millum sólarris og sólsetur | |
| Lógv | 36 | 36 | | Millum sólarris og sólsetur | Framsýningar- og pendliflúgving kann vera í vanda fyri samanbrest við vindmyllur. Lógv reiðrast rættiliga ovarlaga, men flýgur í bútíðini javnan millum búøki og økir, har hon finnur sær føði. Í flytitíðini savnast ofta smærri flokkar í hálendi og láglendi. |
| Mýrisnípa | 36 | ? | | Millum sólarris og sólsetur | Sera trupult er at bera eyga við mýrisnípu við vanligari útsýnisstaðkanning. Stórur partur av framsýnisflúgving og øðrum flogvirksemi er í skýmingini, ella tá ið sýnið er vánaligt, sum ger tað ósannlíkt, at flúgvingin verður eygleidd og skrásett eftirfarandi. Nakað av váða fyri samanstoyti við vindmyllur er ísv. framsýnisflúgving. |
| Spógvi | 36 | N/A | | Millum sólarris og sólsetur | Váði kann vera fyri samanstoyti undir framsýnis- og pendliflúgving. |
| Tangspógvi | 36 | N/A | | Millum sólarris og sólsetur | Váði kann vera fyri samanstoyti undir framsýnis- og pendliflúgving. Framsýnisflúgving kann verða yvir eitt relativt stórt øki. |

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Strandafuglasløg | 36 | 36 | | Millum sólarris og sólsetur | Í verkætlanarøkinum eiga eygleiðingar í minsta lagi at verða gjørdar í 36 tímar fyri hvørt útsýnisstað í bútíðini (vegleiðandi apríl - august, alt eftir slag) og 36 tímar á hvørjum útsýnisstaði uttanfyri bútíðina (september - mars), umframt hóskandi tíðarskeið í flytitíðini. Í ávísum førum kunnu fleiri teljingar vera neyðugar í flytitíðini - sí 4.2. Ferðingartíð og -mynstur eru ofta tengd at veðrinum. Tá so er, eigur ávísur partur av eygleiðingartíðini at verða løgd av til tíðarskeið við mest av ferðafugli.<br><br>Í strandaøkjum og lendi, har flytifuglur og fuglur á vetrarvist (vaðfuglur) er til staðar, skal kanningin eisini fevna um flyting millum hvíldarøki og øki, har teir leita sær føði, bæði við flóð og fjøru, fyri at lýsa virksemið hjá vaðfugli. Havast skal í huga, at nógv vaðfuglasløg umframt um dagin søkja sær føði um náttina. |
| Kjógvasløg | | | | Millum sólarris og sólsetur | Kjógvasløg kunnu hava eyðkenda ferðingarleiðir frá búplássi út á hav, sum kanningarnar skulu miða eftir at lýsa. Ísv. útsýnisstaðkanning má havast í huga, at skúgvur og kjógvi stoyta seg eftir øllum, ið kemur inn á teirra búøki. |
| Másasløg og ternur | | | | Millum sólarris og sólsetur | Másasløg og ternur hava ofta regluligar flogleiðir og bølir nær strondini ("EN: coast") og øki at finna sær føði, sum tað ísv. útsýnisstaðkanning skal miðast eftir at eyðmerkja. Másasløg skulu veljast til útsýnisstaðkanning, har viðkomandi slagið kann hugsast at verða munandi ávirkað av verkætlanini - t.d. vegna ávirkan á fuglabøli, hvíldarøki ella øki, har teir finna sær føði. Ísv. útsýnisstaðkanning má havast í huga, at másar og ternur stoyta seg eftir øllum, ið kemur inn á teirra búøki. |

## Fylgiskjal 2. Kanningarleistur fyri mest vanlig sløg ella bólkað sløg

| Bútíð, vetrarvist og ferðafuglakanningar - samandráttur | | | |
|---|---|---|---|
| Slag | Kanningar-tíðarskeið | Frástøða útum verkætlanarøkið, har dátur (eisini) eiga at verða savnaðar | Viðmerkingar |
| Lómur – *Gavia stellata* | Bútíð | 1 km | Øll vøtn og hyljar, sum lómur reiðrast við. Skráset møguligan geldfugl. Kanningar eiga at verða gjørdar í minsta lagi í eitt ár. |
| Smyril - *Falco* | Bútíð | 2 km | Búøki. Kanningar eiga at verða gjørdar í minsta lagi í eitt ár. |
| Hálendis vaðfuglur | Bútíð | | Teljing av reiðrandi pørum við tvørskurðargongd ("transect") við fýra vitjanum frá miðjan apríl til fyrra part av juli. Kanningar eiga at verða gjørdar í minsta lagi í eitt ár. |
| Láglendis vaðfuglur | Bútíð | | Teljing av búfugli (reiðrandi pørum) við tvørskurðargongd ("transect") við trimum vitjanum frá miðjan apríl til fyrra part av juli. Kanningar eiga at verða gjørdar í minsta lagi í eitt ár. |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Ikki-reiðrandi vaðfuglur | Heyst-Vár | | Teljing av fugli mánaðarliga millum juli og mai á hvíldarstøðum, umframt ymisk tíðarskeið millum flóð og fjøru. Kanningar eiga at verða gjørdar í minsta lagi í eitt ár. |
| Ikki-reiðrandi vatnfuglar (gæs, svanir, dunnur) | Heyst-Vár | | Teljing av fugli tvær ferðir um mánaðin frá mai til august í hvíldarøki og/ella øki, har teir finna sær føði, alt eftir umstøðunum. Kanningar eiga at verða gjørdar í minsta lagi í eitt ár. |

## Fylgiskjal 3. Hvussu dátur kunnu skrásetast

| **Útbreiðslu- og nøgdarkanningar** | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Dato** | **Eygleiðari** | **Byrjan** | **Endi** | **Veðurlíkindi** |
| **20-03-2025** | AA | 12:00 | 15:00 | Sól, turt, gott útsýni |
| **12-06-2025** | AA | 09:00 | 11:00 | Vindur 10-12 m/s (ætt) |

| **Útsýnisstaðkanningar (ÚSK): Yvirlit yvir skrásetingar** | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Dato** | **Eygleiðari** | **Útsýnisstað** | **Byrjan** | **Endi** | **Tímar eygleitt** | **Veðurlíkindi** |
| **20-03-2025** | AA | 1 | 12:00 | 15:00 | 3 | Sól, turt, gott útsýni |
| **12-06-2025** | AA | 2 | 09:00 | 11:00 | 2 | Vindur 10-12 m/s |

| Útsýnisstaðkanningar (ÚSK): Úrslit | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | **Fuglaslag** | **Dato** | **Útsýnis-stað** | **Tal av fuglum** | **Tíð í váðahædd máld í sekundum** | **Samlað tíð í váðahædd, t.e. fleirfaldað um meiri enn ein fuglur flýgur í váðahæddini** |
| **Bútíð (R)** | | | | | | |
| | | | | | | |
| **Uttan fyri bútíð (U)** | | | | | | |
| | | | | | | |
| **Ferð-ingar-tíð (F)** | | | | | | |
| | | | | | | |